## Nýggjur GM stjóri



Fyrrverandi stjórin fyri GMAC Finansiering A/S, René Torp-Nielsen, ið var á vitjan hjá P/F Meinhardt Arge beint áðrenn Ólavsøku, bleiv tann 1. juli settur sum stjóri fyri General Motors í Danmark.

*Kelda: GM Danmark / Informationsafdelingen*

## Toyota við brennikyknum



Stuðlaðir av japansku stjórnini senda Toyota bilar, ið verða drivnir av brennikyknum, til testkoyring í Japan og USA. Málið hjá stjórnini í Tokyo er 50.000 brennikyknubilar í 2010.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Suzuki yvirskot



Suzuki í Japan høvdu í fjør ein vøkstur uppá 20 prosent í mun til árið fyri. Framrokningar vísa at yvirskotið í ár verður umleið 4,5 milliardir krónur. GM eigur 20 prosent í Suzuki, ið hava ein serkunnleika innan smærri væl umtóktar bilar

*Kelda: Motor Magasinet*

# Mála við bummlyftara - sparir nógva arbeiðstíð

**Í okkara skiftandi veðurlag er tað soleiðis, at t.d. málarar mugu útnytta tíðina væl, meðan veðrið er gott. Við einum bummlyftara ber til at mála stórar bygningar uppá stutta tíð uttan at brúka stigar ella stillads**




*Teir sum arbeiða við bummlyftaranum stýra øllum funktiónunum og koyringini aftur og fram frá lyftini*

BUMMLYFTARI

*Magnus Gunnarsson*

Tað sær út sum, at tá onnur halda summarfrí, hava málararnir kring landið úr at gera. Um turt er í veðrinum er hetta tann besta tíðin á árinum at mála í, leingi ljóst og kanska lætt at fáa ungfólk, ið hava summarfrí, at hjálpa til í málaraarbeiðinum. Stóri bygningurin hjá Berg Motors á Hálsi, ið annars ikki hevur verið so litfagur, er nú málaður í øllum ælabogans litum. Við tað at ein bummlyftari, har tann sum málar, stendur í eini lyft og stýrir hesi lyftini akkurát har hann sjálvur vil, bleiv brúktur, gekk arbeiðið skjótt fyri seg. Um undirlendið rundan um bygningin er slætt, er ongin trupulleiki at mála ein stóran bygning uppá heilt stutta tíð. Hallið á undirlendinum má tó ikki verða meira enn 5 stig

Bygningurin hjá Berg Motors bleiv málaður av Anskar Hansen, málarameistara í Klaksvík, ið hevði leiga ein Manitou 165 ATJ bummlyftara frá Sp/f KBI v.Karl Birgir Isaksen í Klaksvík. Fyritøkan umboðar nógv ymisk sløg av maskinum og amboðum til ídnaðin og byggivinnina, sum teir selja ella leiga út. Manitou 165 ATJ trekkjur og dreygar á øllum fýra hjólunum, lyftin lyftur 2 persónar ella 250 kg og arbeiðshæddin er upp til 16.50 m.




*Her er Anskar Hansen, málarameistari saman við soninum, Jóhan Nystrøm Hansen, í ferð við at mála bygningin hjá Berg Motors á Hálsi*

MANITOU

# Sóltak og aircondition kunnu væl saman

**Í fleiri ár høvdu bilaframleiðarar ta fatan, at bilar við aircondition høvdu ikki brúk fyri sóltaki. Hetta vísti seg tó ikki at vera so. Teir eru komnir eftir, at aircondition skipanin virkar nógv betur saman við sóltakinum**



*At hava bæði sóltak og aircondition í bilinum er ein góð loysn*




SÓLTAK / AIRCONDITION

*Magnus Gunnarsson*

Tað hevur nú í mong ár verið soleiðis at nýggir bilar við aircondition ikki hava sóltak. Fleiri bileigarar, ið hava fingið sóltak sett í hesar bilar seinni, hava funnið út av at aircondition skipanin virkar betur saman við sóltakinum. Tað at hava bæði sóltak og aircondition í bilinum er ein góð loysn, er staðfest av royndum, ið eru gjørdar á kanningarstovum. Hetta hevur havt við sær, at ein hópur av bilum við aircondition fáa sóltak ísett aftaná. Í framtíðini koma vit at síggja alt fleiri nýggjar bilar við sóltaki og aircondition, heilt frá vanligum standardbilum til teir stóru luksusbilarnar.

*Kelda: Motor Magasinet*



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

Fyrivarni verður tikið fyri villum



**CITROEN XSARA 1.9HDI 5H**
Árg Juni'99, Km 117.000 .
Kr. 137.000.



**CITROEN XANTIA 1.9TD STC**
Árg Mars'99, Km 45.000 .
Kr. 160.000.



**MITSUBISHI CARISMA 1.6GL 5H**
Árg Okt'96, Km 81.000 .
Kr. 85.000.



**FORD ESCORT 1.8I 4H**
Árg Juli'96, Km 94.000 .
Kr. 65.000.



**JEEP CHEROKEE 2.5TD 5H**
Árg Juli'97, Km 80.000 .
Kr. 135.000.



**SEAT CORDOBA 1.9SDI STC**
Árg Aug'99, Km 36.000 .
Kr. 115.000.



**CITROEN XSARA 1.6I STC**
Árg Apr'99, Km 36.000 .
Kr. 133.000.



**MITSUBISHI GALANT 1.8GLSI SPORT**
Árg Juni'92, Km 150.000 .
Kr. 37.000.



**FORD MONDEO 1.8 4H**
Árg Juni'01, Km 16.000 .
Kr. 210.000.



**MAZDA DEMIO 1.3 5H**
Árg Feb'99, Km 50.000 .
Kr. 87.000.



**PEUGEOT 306 1.9D 4H**
Árg Apríl'95, Km 152.000 .
Kr. 80.000.



**SUZUKI BALENO 1.6I 4H**
Árg Apríl'00, Km 27.500 .
Kr. 105.000.



**CITROEN XANTIA 2.0HDI 5H**
Árg Jun'99, Km 43.000 .
Kr. 160.000.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo






**ROVER 200**
Árg Feb-99, Km 40.000.
Kr. 124.000.



**VW GOLF VARIANT SDI**
Árg Jan-97, Km 88.000. Diesel.
Kr. 119.000.



**SEAT CORDOBA TDI SPORT**
Árg 07/00, Km 85.000. Diesel.
Kr. 136.000.



**FORD MONDEO 1,8I**
Árg 11/00, Km 28.000. Bensin nýsýnaður. Kr. 168.000.

Audi SEAT
Bilasølan v/ Øssur Johannesen
tel 315354 - www.audi-vw.net



**FORD ESCORT HATCHBACK DIESEL**
Árg des.96, Km 105.000.
Kr. 85.000.



**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg aug.99, Km 26.700. Sera væl hildin, sleipikrók. Fyrr kr.108.000. Nú tilboð, uttan bil í býti kr.90.000. Kr. 95.000.



**DAIHATSU SIRION 5/HUR_AR**
Árg apr.2000, Km 51.000.
Kr. 80.000.



**DAIHATSU COURE 1. DELUXE**
Árg sep.2000, Km 8.700. Sera væl hildin. Til sølu vegna útbúgving uttanlanda. Sentrallás el- rútar, el-síðuspegl, servostýring v.m..
Kr. 88.000.



**FORD FOCUS CHIA**
Árg mar.99, Km 51.800. Sera væl hildin, sentrallás, CD anlegg, hita í setrunum, el-síðuspegl v.m..
Kr. 135.000.



**PEUGEOT 406 STATIONCAR**
Árg mar.99, Km 74.000. Sera væl hildin. Turbo Diesel, aircondition, fj.stýrt sentrallás, el-rútar, el-síðuspegl, CD anlegg v.m..
Kr. 165.000.



**ROVER 75 2.0 V6 CLUB**
Árg jun.2000, Km 36.000. Klimaanlegg, el- rútar, el-síðuspegl, CD anlegg+nógv eykaútstýr.
Kr. 248.000.



**HYUNDAI ATOS**
Árg jun.99, Km 39.000. Vælhildin.
Kr. 68.000.

Pf. D. B. Bilar
Jónas Broncksgøta 15
Tel. 310600 - Fax 310650